# Stórt samkomuvirksemi um høgtíðina

**Umframt vanliga fundarvirksemi verður nógva staðni skipað fyri nýggjársveitslum fyri yngri og eldri**



SAMKOMUR
*Jan Müller*

Jólini eru familjuhøgtíðin burturav. Tað tykist vera hugburðurin hjá teimum flestu. Men treyðugt so. Kirkjur og samkomur kalla saman til gudstænastur, fundir og veitslur, har jólaboðskapurin er í miðdeplinum.

Í fólkakirkjuni hevur tað altíð verið gjørt nógv burturúr jólaaftan. Soleiðis hevur tað ikki altíð verið í fríkirkjunum, men nógvu tey seinnu árini er tað vorðið alt meiri vanligt, at tað eisini í fríkirkjunum verður skipað fyri serligari gudstænastu jólaaftan. Tá eigur jólasangurin sín stóra part í skránni.

Í summum brøðrasamkomum er serlig samkoma jólaaftan. Í nógv teimum flestu brøðrasamkomunum eru evangeliskir fundir jólakvøldini. Í teimum stóru samkomunum í Ebenezer í Havnini og Betesda í Klaksvík hevur tað ofta verið soleiðis, at sjómenn hava havt orðið jólakvøldini, og útisetar, sum vitja heima á jólum, hava eisini átt sín lut í hesum fundunum.

Inntil fyri ikki so nógvum árum síðani var tað vanligt, at jóla– og nýggjársveitslur vórðu hildnar frá 2. jóladegi og inntil eina ferð eftir nýggjár. Soleiðis er tað framvegis nógva staðni – bæði í missiónshúsum og salum. Men nú kemur tað ofta fyri, at jólaveitslurnar fyri tey yngstu eru fyri jól, meðan veitslurnar fyri tey eldru verða hildnar millum jól og nýggjár og viðhvørt fyrst í nýggja árinum.

Í fleiri samkomum plagdi tað at vera vanligt at hava nýggjársveitslu gamla árs kvøld. Nú er broytt næstan alla staðni. Í missiónshúsum og salum verður tað ikki hildið at vera ráðiligt, at børnini eru heima, meðan foreldrini eru til kristiligar samkomur. At tað er fallið í góða jørð, at veitslurnar av hesum slagnum eru fluttar, sigst síggjast aftur á luttøkutalinum. Tað er hækkað heilt fitt.

Onkuntíð hevur verið skipað fyri stórum kristiligum tiltøkum á jólum. Nú eru sovorðin tiltøk, sum ætlast at savna nógv fólk, ikki so mong á jólum. Hugburðurin tykist, sum tað var nevnt omanfyri, at vera, at jókini eru familjuhøgtíðini fram um alt annað.

Seinast brøðrasamkomurnar skipaðu fyri stórum tiltaki var annað vikuskiftið í november, tá ið samfelagsfundirnir vóru í Havnini. Hetta vikuskiftið mundi talið á teimum, sum vitjaðu í ítróttarhøllini á Hálsi vera væl omanfyri tvey túsund. Øll vóru ikki til staðar í senn, men leygarkvøldið og sunnudagin mundi luttøkutalið vera omanfyri fimtan hundrað.

Stórt felags kór setti sín dám á. Frá luttakarum verður sagt, at tað var merkisvert, at sangstílurin hjá kórinum var meiri amerikanskur, enn hann áður hevur verið, og tað var heilt týðuligt, verður sagt, at nógv umhildnu Bill Gaither sendingarnar í sjónvarpinum – tær fáast eisini á videobondum – hava havt stóra ávirkan á tey, sum velja sangirnar.

Myndirnar tók Jens Kristian Vang á samfelagsstevnuni á Hálsi í Havn.





Vetrarferðatilboð
14.09.2002 - 10.05.2003
The North Atlantic Link



galdandi frá 14.09.2002 - 10.05.2003

Íroknað prísin er: Ferðin aftur og fram við Norrønu í 4-koyggjukamari við WC/bað.

Uppihald omanfyrinevnda dagatal á nevndu frítíðardeplum. Danland hevur eisini líknandi deplar aðrastaðni í Danmark.




Íroknað prísin er: Ferðin aftur og fram við Norrønu í einum av nevndu kamarssløgum. Fyri ShetlandsCruise 2 nætur og vikuferð 9 nætur v. morgunmati á einum av nevndu gistingarstøðum.

Á vallaraheiminum er ikki íroknaður morgunmatur. Á hotellunum og fyri privata gisting er innivist í dupultkamari, meðan á vallaraheiminum í felagsrúmi. Fyri børn, einakamar ella eykasong eru aðrir prísir galdandi. Nærri fæst at vita á skrivstovu okkara.




Ebeltoft (myndin) · Blokhus · Hirtshals

4.995,- gisting 7 nætur

Hesir eru í Søndervig, Fanø, Rømø, Bork Havn, Lemvig, Skagen, Øster Hurup, Fåborg, Rudkøbing, Østersøen - Møn, Blåvand og Bornholm.

Shetland Cruise

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|---|
| Grand-/Queens Hotel | 1.550,- | 1.730,- |
| Shetland-/Lerwick Hotel | 1.690,- | 1.870,- |
| Herrislea House Hotel | 1.550,- | 1.730,- |
| Privat Gisting | 1.280,- | 1.460,- |
| Vallaraheim | 1.010,- | 1.190,- |

Pakkaferð við innivist í 9 dagar

| | 4-koyggjuk. við WC/bað | 2-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|---|
| Grand-/Queens Hotel | 4.100,- | 4.280,- |
| Shetland-/Lerwick Hotel | 4.940,- | 5.120,- |
| Herrislea House Hotel | 4.100,- | 4.280,- |
| Privat Gisting | 3.220,- | 3.400,- |
| Vallaraheim | 2.030,- | 2.210,- |

Easterhoull Chalets
1 vika í summarhúsi
2 vaksin og 2 børn við bili

| | 4-koyggjuk. við WC/bað |
|---|---|
| Hús við 2 rúmum | 4.940,- |
| Hús við 3 rúmum | 5.630,- |

Pakkaferð við gisting á hotelli
2 ferðandi í bili, gisting 7 nætur á Hotel Hanstholm
fyri hvønn 3.290,-
galdandi frá 14.09.2002 - 10.05.2003
Íroknað prísin er: Ferðin aftur og fram við Norrønu í 4-koyggjukamari v. WC/bað. Uppihald: 7 nætur á Hotel Hanstholm í dupultkamari við WC/bað. Á hotellinum er morgunmatur íroknaður.



2 fyri 1 ferðist tvey - gjaldið fyri ein!
galdandi til og við 1. mai 2003
Ferð fyri tvey vaksin við bili Tórshavn - Hanstholm og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað
2.990,-



2 fyri 1 ferðist tvey - gjaldið fyri ein!
galdandi til og við 1. mai 2003
Ferð fyri tvey vaksin við bili Tórshavn - Lerwick og aftur í 2 koyggjukamari við WC/bað
2.200,-



SMYRIL LINE
e-mail: booking@smyril-line.fo · www.smyril-line.fo
SMYRIL LINE
Tel 34 59 00




# Prógv á Føroya Sjómansskúla

**Hósdagin fingu tríggir flokkar á Føroya Sjómansskúla handað prógv. Ein flokkur við heimaskiparum, ein við skiparum og ein flokkur við fimm tók prógv sum skipsførarar**

*Myndir: Heri á Rógvi*



**Heimaskiparar:** *F.v. Jóhan av Reini, Tórshavn, Jónhard Frederiksberg, Gøtueiði, Johan Hansen, Miðvágur, Haldor Hammer Haraldsen, Sandavágur, Gunnar Fróði Erlandson Isaksen, Vestmanna, Jóhannus Dánjalsson Jacobsen, Vestmanna, Emil Jespersen, Tvøroyri, Pauli Joensen, Tórshavn, Klæmund Ovason Johannesen, Tvøroyri, Pól John Tryggvi Midjord, Sumba, Thomas Albert Ryggshamar, Lambi, Malena Frederikka Sivertsen, Norðdepil, Petur Holm Stórhamar, Trongisvágur, Jørgin Thomsen, Skáli.*
*Virðislønir fingu Gunnar Fróði Erlandson Isaksen, Malena Frederikka Sivertsen og Jørgin Thomsen.*



**Skiparar:** *F.v. Jan Breiðaskarð, Signabøur, Bárður Kjartansson Egholm, Eiði, Martin Gøthe, Norðragøta, John Leif Suni Hammer, Tórshavn, Jóannis Jónson Hansen, Sørvágur, Hanus Debess Højgaard, Tórshavn, Kjell Johansen, Strendur, Sverrir Bjørn Kjærbo, Skopun, Pól John Tryggvi Midjord, Sumba, Janus Petersen, Húsavík, Gunleif Lyngvej Poulsen, Sandvík.*
*Virðislønir fingu Bárður Kjartansson Egholm, Kjell Johansen og Janus Petersen.*



**Skipsførarar**: *F.v. Jógvan Christiansen, Tvøroyri, Fríði Danberg, Vágur, Rúni Hansen, Toftir, Pauli Højgaard, Rituvík, Rúni Mohr, Skopun.*
*Pauli Højgaard, Fríði Danberg og Rúni Hansen fingu virðisløn*